Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

ENDURLÝSING

## Vaskifólk

### til Barnagarðin á Mýrunum

Søkt verður eftir 2 - 3 vaskifólkum til Barnagarðin á Mýrunum at byrja 1. juni 2007

Vaskiarbeiðið er ásett til 8 tímar um dagin tilsamans og kann býtast upp millum 2 ella 3 vaskifólk. Avtala kann eisini gerast um at býta arbeiðið upp millum fleiri vaskifólk, t.d. at vaska aðru hvørja viku, ella nakrar dagar um vikuna.

Arbeiðstíðin liggur uttanfyri upplatingartíðina hjá stovninum

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 21 82 54

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 25. mai 2007.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Postboks 139
FO-600 Saltangará

Vágs Kommuna

## Broyting í almennu byggisamtyktini

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at Vágs Býráð á fundi 17.04.2007 samtykti at leggja ein part av bústaðarøkinum "B8" afturat økinum"C1" sum er avlagt til barnagarð.

B8-økið minkar við 1882 m$^2$ og C1-økið verður víðkað við 1882 m$^2$.

Tilfar, sum vísir broytingina, liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá mikudegnum 2/5 2007 til fríggjadagin 11/6 2007 í vanligari avgreiðslutíð.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at lata Vágs Kommunu skrivliga í seinasta lagi 3/8 2007.

**VÁGS KOMMUNA**
Vágsvegur 22
900 Vágur

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.

## Advokatskrivstovan

Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn

Telefon 31 11 45
Telefax 31 15 25
jura@jura.fo
www.jura.fo



## Sethús í Niels Finsensgøtu

Eini eldri sethús, Niels Finsensgøta 33, eru til sølu, um nóg høgt boð fæst.

Húsini eru upprunaliga bygd fyrst í 1900-talinum.

Grundøkið er til víddar 194 m$^2$. Sjálv húsini eru uml. 48 m$^2$ og í trimum hæddum.

Sambært byggisamtyktini liggur ognin í 2. grundumráði.

**Húsini eru innrættað soleiðis:**

**Stovuhædd:** Gongd, lítið kamar, tvær stovur, køkur við kolkomfýri, WC og spísikamar.

**Loft:** Gongd og tvey kømur.

**Kjallari:** Fyrrverandi handilshøli og tvey onnur rúm, harav tað eina vaski-/fýrrúm.

Leyststandandi hjallur og eisini garaga.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, e-mail ojk@jura.fo ella skrivaran Elin Svínoy, e-mail els@jura.fo

## Klinikkassistentur søkist

Vit søkja eftir klinikkassistenti at byrja skjótast gjørligt ella sambært avtalu. Møguleiki er fyri upplæring. Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 31 51 58.

Umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum skal sendast til

Tannlæknastovuna í Dalatúni áðrenn týsdagin 22 mai 2007.

**TANNLÆKNASTOVAN Í DALATÚNI 19**
**100 Tórshavn**
**v/ Marnar Gaard, Ísak Thomassen og Regin Eikhólm**

## Søkt verður eftir avloysara til sambýli Eysturstræti 4

**Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í barnsburðafarloyvi frá 01.07.07 til 01.02.08.**

Sambýli Eysturstræti 4. er viðgerðarstovnur fyri yngri við sálarsjúku.

Tann, ið settur verður, skal verða heilsurøktari, røktari, ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Talan er um eitt fulltíðarstarv. Arbeitt verður allar gerðandisdagar frá kl. 8.00 til 16.00

Stovnurin arbeiðir eftir miljøterapeutiskum meginreglum. Sum starvsfólk skal tú átaka tær ymiskar uppgávur, tí er tað umráðandi, at tú ert álítandi, jaligur, hevur góð samstarvsevnir, ert ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Eisini verður stórur dentur lagdur á, at umsøkjarin er nærlagdur og dugir at seta seg inn í, og virða støðuna hjá tí einstaka.

Lønar- og setanartreytir sambært avarandi yrkisfelag.

Umsøknir við prógvum skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 29.05.07

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Sámal Lindenskov, deildarleiðara. Tlf. 219152

**Sambýli Eysturstræti 4.**
Att: Sámal Linenskov
Fo-100 Tórshavn.
Tlf 219152

parfumari Drós
Til Sølu

- Handilin er í støðugari framgongd
- Umboðar tey kendastu merkir
- Liggur væl fyri í miðbýnum
- Góðan kundaskara

Vil tú hava avbjóðingar er hetta ein góður møguleiki.

Meir fæst at vita við at venda sær til tlf 514811 ella á mail dros@dros.fo

CLINIQUE
ESTÉE LAUDER
aramis
ORIGINS

Vit selja nýggja bátar í ymiskum støddum og sløgum m.a. hendan



ring og hoyr nærri,
eisini um aðrar møguleikar

## HP.MARINE - SP/F RÚNAR

Túnagøta 1 • 600 Saltangará
tlf. 219450 • Fax 449191 • hpe@kallnet.fo